## Kunning um pinkubarnasvimjing

*Hvat gera vit, tá ið vit svimja við pinkubørnum?*
Vit gera ymsar venjingar, og vit syngja og gera rørslur til sangirnar. Venjingarnar hava til endamáls at gera børnini trygg og sjálvstøðug í vatni. Týdningarmest er tó at foreldrini njóta hetta høvið, at fáa eina gevandi og mennandi løtu saman við børnunum, uttan at verða órógvað av telefonum, teldum og so framvegis.

*Hvør kann svimja við barninum?*
Bæði mamman og pápin kunnu svimja við barninum. Og tað er sera gott, um bæði foreldrini kunnu vera við. Tað er eisini í lagi, um omman, abbin ella onnur eru við. Í mesta lagi tvey vaksin kunnu vera úti í við hvørjum barni. Systkin kunnu *ikki* koma útí, men kunnu sita á kantinum og hyggja:-)

*Hvat skulu tit hava við?*
Gott er at hava tvey handklæði til barnið; eitt at hava barnið ballað í, tá ið gingið verður millum skiftingarrúm og svimjihyl, og eitt at turka barnið við, tá ið liðugt er. Orsakað av klorinum í svimjivatninum er týdningarmikið, at barnið verður væl vaskað og skolað, tá ið liðugt er at svimja. Er tað neyðugt, smyr so barnið við vætukremi. Annars verður mælt til at hava okkurt lítið til matna og at drekka, um hildið verður, at barninum tørvar hetta.

*Hvørjum skal barnið vera í?*
Pinkubarnið skal vera í svimjiklæðum ella svimjiundirbuksum, sum sita tætt um lørini. Summum dámar væl at brúka ullint, føroysk undirklæði, og hesi pløgg eru eisini góð. Einnýtis svimjiblæur til børnini kunnu keypast í vanligum matvøruhandlum. Børn, ið duga at ganga, eiga at ganga í hosum.

Vit brúka ikki armringar ella svimjiringar.

*Er annað, tú skalt hava í huga?*
Hitin í hylinum er í mesta lagi 32 stig. Best er at royna av baða barninum heima í vatni, ið eisini er umleið 32 stig, áðrenn farið verður at ganga til pinkubarnasvimjing. Soleiðis kann barnið venja seg við umstøðurnar í hylinum.

*Onnur atlit!*
Vinaliga ikki koma í hylin fyrr enn tykkara svimjitími byrjar. Tað órógvar, um ov nógv fólk eru í hylinum í senn. Øll skulu vaska sær væl og gera hárið vátt. Um tit ikki ynskja at gera hárið vátt, verða tit biðin um at seta hárið upp ella brúka svimjihettu.

***Ivast tú í onkrum, ber til at ringja til Majbritt Mohr, lærara í pinkubarnasvimjing. Telefonnummarið er 31 48 20 ella 58 97 18.***